# Fylgja landsliðnum allastaðni

**Fyri teir tríggjar Kevin, Graham og Dario eru Føroyar favorittur leygardagin móti Skotlandi. Teir ferðast allastaðni við skotska landsliðnum, og teir vóna tað besta leygardagin. Tað kann fella báðar vegir, siga teir**

FÓTBÓLTUR
*Heri á Rógvi*



*F.v. Kevin Riddel, Graham Barnott og Dario Walker eru komnir til Føroya í sambandi við landsdystin millum Skotland og Føroyar. Teir siga seg hava virðing fyri føroyska landsliðnum og meta, at úrslitið kann fella báðar vegir. Og um veðrið siga teir, at tað er júst sum í Skotlandi. Myndin er tikin á Tórsvølli, har skotska landsliðið ikki slap at spæla*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í øllum regninum hósmorgunin runnu vit okkum á tríggjar skotar, sum eru komnir til Føroya í sambandi við landsdystin millum Føroyar og Skotland. Dysturin verður leiktur leygardagin, og vóru teir tríggir við flogfari úr Skotlandi mikukvøldið.

Teir tríggir eru Kevin Riddel, Graham Barnott og Dario Walker. Hetta er langt frá fyrstu ferð, at teir eru á ferð í sambandi við ein landsdyst hjá skotska landsliðnum. Teir kunnu remsa eina longri røð av londum, har teir hava verið og vitjað í fótbóltsørindum. Týskland, Frankaríki, Póland, Belgia, Holland, San Marino, Italia og Kroatia eru bert nøkur av londunum, har teira hava vitjað.

Eini 600 pund – umleið 7.000 kr - skuldu teir av við fyri at vitja í Føroyum, men tað gera teir fegnir.

– Tað er so nógv, tú kanst brúka pengar uppá, sigur Dario.

Teir eru allir limir í Tartan Army, sum er eitt slag við viðhaldsfelag hjá skotska landsliðnum, og hesir stuðla dyggiliga skotska landsliðnum. Viðhaldsfelagið hevur so ymisk lokalfeløg kring landið. Tveir teirra eru limir í Perth Tartan Army og ein í Tartan Army fyri norður Skotland.

Teir báðir, Kevin og Graham, eru úr Perth og Dario býr í býnum Ayr. Hann heldur við Ayr United, har føroysku Jens Kristian Hansen og Jens Martin Knudsen eisini royndu seg eina tíð.

Allar halda teir við teimum lokalu liðunum úr býunum, har teir búgva. Lið sum Celtic og Rangers hava teir ikki nógv til yvurs fyri.

Tað er heldur ikki so nógv at taka feil av, at talan er um skotskar viðhaldsmenn, tí búnin er eyðkendur. Teir eru altíð – á fótbóltsferðum – íklæddir tey eyðkendu »kiltini« ella skotaskjúrt, sum skuldi verið eitt føroyskt orð fyri búnan.

Skjúrtini eru úr ull, og skuldu verið heit at ganga í. Til hvørt skjúrt verða einir 7-8 metrar av vevaðari ull nýtt.

**Báðar vegir**

Spurdir um úrslitið leygardagin, so siga teir, at tað kann fella báðar vegir.

– Tað verður entin ein katastrofa fyri okkum, og vit tapa. Ella verður viljin so sterkur, at liðið klárar at hála ein 2-0 sigur í land, siga teir tríggir.

– Veitst tú av, at føroyska liðið er favorittur?, spyrja teir tríggir. Teir hava virðing fyri føroyska liðnum, og teir eru alt annað enn vísir í, at skotsku leikararnir megna at sigra á føroysku áhugaleikarunum.

Skotska landsliðið hevur ikki havt góð úrslit at vísa á seinastu tíðina. Illa gekst í hond í undankappingini til HM, og vit kenna øll søguna frá dystinum á Svangaskarði, tá Hans Fróði Hansen í síðstu løtu tryggjaði Føroyum ein javnleik og eitt stig.

Teir tríggir greiða frá, at dysturin móti føroyingum á Svangaskarði seinast var alt annað enn góður fyri skotar. Hesin dysturin varð leiktur á Toftum frammanfyri 4.500 áskoðarum hin 5. juni 1999.

– Tað kendist flóvisligt fyri okkum, og Matt Elliott, sum fekk reytt kort fyri at sláa Toda Jónsson, gjørdist syndabukkur, greiða teir frá.

Hesin sami Elliott er ikki longur at síggja á skotska landsliðnum.

Skotska landsliðið byggir í løtuni eitt nýtt lið. Sambært teimum trimum er eingin veruligur stjørnuleikari á liðnum móti Føroyum.

Seinasti dysturin hjá skotska liðnum var ímóti dønum. Ebbe Sand tryggjaði dønum ein 1-0 sigur. Teir tríggir halda úrslitið móti dønum vera á góðari leið, tá hugsað verður um, hvussu illa skotska liðið spældi.

Nýggjur venjari varð eisini settur í starv til skotska landsliðið, áðrenn hesa undankappingina. Talan er um mæta venjaran Berti Vogts, sum áður hevur staðið á odda fyri týska landsliðnum.

– Hann er vorðin nógv útskeldaður í skotsku pressuni, sum hevur hug at geva honum skylduna fyri vánalig úrslit. Hann hevur gjørt fleiri broytingar í skotsku fótbólti. Eitt nú vil hann ikki, at útlendingar skulu vera við liga-kup kappingini í Skotlandi, siga teir tríggir.

Áðrenn dystin leygardagin ætla teir tríggir at uppliva eitt sindur av lívinum í Havnini. Teir vera ikki einsamallir sum skotskir viðhaldsmenn á Svangaskarði, tí roknað verður við einum 600 skotum til dystin.

Higartil hevur teimum dámað væl í Føroyum, og veðrið ger ikki teimum nakað.

– Tað er akkurát sum í Skotlandi, siga teir tríggir fryntligu skotarnir at enda.

## Luftbrúgv millum Føroyar og Skotland

**520 fólk koma við flogfari til Føroya úr Skotlandi í sambandi við landsdystin leygardagin**

LANDSDYSTUR
*Heri á Rógvi*

Hjá Atlantic Airways hava tey úr at gera í hesum døgum. Vanliga flýgur Atlantic til Aberdeen í Skotlandi nakrar ferðir um vikuna. Afturat hesum eru tríggir leigutúrar bílagdir, soleiðis at tað í alt koma sjey flogfør úr Skotlandi í sambandi við landsdystin. Flogførini flúgva úr Glasgow ella úr Aberdeen.

Fyrsti flogfarið fór úr Skotlandi mikukvøldið. Tvey flogfør koma úr Skotlandi um dagin hósdagin, fríggjadagin og leygardagin. Hósdagin er ein av túrunum ein leigutúrur við skotska landsliðnum. Eisini viðhaldsfelagið Tartan Army hevur bílagt leigutúrar úr Glasgow.

Kent Christensen, sum starvast hjá Atlantic Airways, upplýsir, at talan er um í alt 520 fólk, sum koma til landið. Seks av teimum sjey flogførunum eru stúgvandi full.

Sostatt er næstan fast millum Føroyar og Skotland. Og fólkini skulu eisini flúgvast heimaftur.



*Tað rullar inn hjá Magna Arge og Atlantic Airways. Atlantic skal flúgva heili 520 skotar til Føroya í sambandi við landsdystin leygardagin*



# Tróndur í oljuvinnuna

**Gamla strandfaraskipið Tróndur fer nú í oljuvinnuna. Umvælingar eru gjørdar, so skipið lýkur krøvini til eitt havgangandi skip, og í næstu viku verður kósin sett móti oljufeltunum hjá Statoil uttan fyri Stavanger, har Tróndur skal liggja sum vaktarskip**

OLJUVINNA
*Jón Brian Hvidtfeldt*




*Gamla strandfaraskipið Tróndur fer nú í oljuvinnuna, har hann skal virka sum vaktarskip. Nakrar umvælingar skuldu gerast á skipið, áðrenn tað fyrr í vikuni varð góðkent*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

43 ára gamla fyrrverandi strandfaraskipið Tróndur, sum Sjúrður Gorm Petersen keypti fyrr í ár, fer nú í oljuvinnuna, har hann skal virka sum vaktarskip. Tróndur skal avloysa Orion, sum í seinastuni hevur ligið sum vaktarskip í norskum sjógvi, men sum nú kemur aftur til Føroya, tí viðlíkahaldsarbeiði skal gerast. Fyribils skal Tróndur avloysa í seks vikur, men Sjúrður Gorm Petersen sigur, at tað kann væl hugsast, at Tróndur verður í oljuvinnuni longur enn so.

**Broytt klassan**

Áðrenn Tróndur kann virka sum vaktarskip, var neyðugt at broyta klassan, so skipið lýkur treytirnar, sum verða settar til havgangandi skip. Tróndur er sum kunnugt gamalt strandfaraskip, og hevur bara verið góðkendur til at sigla í mesta lagi 45 fjórðingar úr landi. Men nú eru ábøtur gjørdar á skipið, og í vikuni varð Tróndur góðkendur sum havgangandi skip. Sjúrður Gorm Petersen greiðir frá, at ávís umhvørviskrøv verða sett til vaktarskip, og tað kravdi eisini at smávegis ábøtur skuldu gerast á Trónd.

Hann sigur, at Tróndur, sum er bygdur í Aukra í Norra fyri 43 árum síðan, er í sera góðum standi. Fyrr í vikuni vóru teir, saman við klassanum og Skipasýninum tekniskan roynd-artúr við skipinum, og tá varð Tróndur eisini góðkendur sum havgangandi skip. Sjúrður Gorm Petersen metir, at Tróndur eisini er væl egnaður til aðrar uppgávur innan oljuvinnuna, m.a. tí at gott pláss er á dekkinum.

**Arbeiða fyri Statoil**

Sjúrður Gorm Petersen sigur, at Tróndur skal halda vakt fyri Statoil á feltinum Midgaard, tætt við Oskarfeltið, uttan fyri Kristianssund. Hann skal loysa av Orion, sum er hitt skipið hjá Sjúrða Gorm Petersen. Fýra mans vera við Trónda.

# Ongi krøv um hvílitíðir

**Í útbjóðingini av bussleiðini í Tórshavnar Kommunu verður dentur lagdur á, at brúkarin skal koyra í nýggjum bussum, at tað skal vera lætt at sleppa í og úr bussinum, at tað skal vera skjótt og lætt at keypa ferðaseðil og at rørslutarnað eisini skulu hava møguleika at nýta bussarnar. Alt samalt viðurskifti, sum skulu vera brúkaranum til gagns. Eitt krav verður tó ikki sett: at bussførarin skal hava møguleika at hvíla seg, so hann er væl fyri at koyra í nógvu ferðsluni í høvuðsstaðnum og kann flyta brúkaran trygt aftur og fram**

BUSSLEIÐIN
*Jón Brian Hvidtfeldt*



Hvussu leingi kann ein bussførari koyra, áðrenn hann hevur rætt til hvíld? Hvussu leingi er ráðiligt hjá føraranum at koyra, áðrenn hann gerst troyttur, verður til ampa í ferðsluni, ella trygdin beinleiðis kemur í vanda? Í Føroyum er tað ein spurningur millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara.

Í grannalondum okkara og í ES finnast krøv, sum siga, hvørji rættindi bussførarin hevur til hvíld. Men tílík krøv finnast ikki í Føroyum, og í Vinnumálaráðnum, sum er politiski myndugleikin á økinum, verður ikki arbeitt við málinum. Spurningurin er ikki aktuellur í løtuni verður sagt.

Koyringin hjá Bussleiðini í Tórshavnar Kommunu varð tíðliga í summar boðin út, tilboðini eru komin inn, og býráðið hevur gjørt av at arbeiða víðari við onkrum av tilboðunum. Men heldur ikki í býráðnum er spurningurin um hvílitíðirnar hjá bussførarunum aktuellur.

- Vit hava ikki sett fram nøkur krøv um at bussførarar skulu hava ávísar hvílitíðir, tá leiðirnar vóru bodnar út – tað er ikki okkara borð at taka støðu til handa spurningin, segði Sjúrður Olsen, formaður í Teknisku Nevnd í Tórshavnar Kommunu við Sosialin fyrr í vikuni. Einasta krav er, at fólkið, sum skal arbeiða í einskildu, kommunalu busskoyringini, skal vera limur í einum fakfelag.

**Saknar reglur á økinum**

Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd, saknar greiðar reglur á økinum. Hann vísir á dømi, har bussførarar í høvuðsstaðnum hava koyrt í átta til níggju tímar út í eitt, uttan steðg. Hann metir, at Tórshavnar Býráð eigur at taka spurningin við, tá støða skal takast til tilboðini uppá busskoyringina.

- Tað er greitt, at vit hava ongar reglur á økinum, og tí hevur býráðið sum so ongar skyldur. Men eg haldi, at býráðið átti at tikið spurningin við í viðgerðina, og gjørt ásetingar um fastar hvílitíðir, nú busskoyringin næstu sjey árini verður løgd í fastar rammur, sigur Jón Kragesteen. Útbjóðingin av busskoyringini er galdandi frá 1.februar næsta ár til 31. januar 2010. Jón Kragesteen vísir á, at tað kann vera trupult at koma aftur um aftur og tosa um hvílitíðir, tá avgerðin er tikin, og sáttmálarnir eru undirskrivaðir.

**Regluliga hvíld**

Sum dømi um, hvussu reglurnar kundu sæð út, ber til at hyggja at norsku reglunum fyri bussførarar. Í Norra má ein bussførari t.d. í mesta lagi koyra buss í níggju tímar um dagin, men tó kann hann, tveir dagar um vikuna, koyra tíggju tímar. Men reglurnar siga samtíðis, at hann innan fyri 14 dagar, í mesta lagi hevur loyvi at koyra 90 tímar. Somuleiðis siga norsku reglurnar, at ein bussførari ikki má koyra meira enn 4,5 tímar, áðrenn hann skal hava ein steðg uppá í minsta lagi 45 minuttir. Í Danmark og restina av ES eru líknandi reglur fyri hvílitíð hjá bussførarum.

Jón Kragesteen heldur, at norsku- og ES-reglurnar kunnu vera góðar at meta seg eftir, tá vit í Føroyum skulu gera okkara egnu reglur á økinum. Hann vísir á, at trupulleikin er bara at finna í Bussleiðini í høvuðsstaðnum, tí hjá Bygdaleiðum eru onnur viðurskifti galdandi, og har hava bussførarar sum er møguleika fyri hvíld.